## Sheila kann fáa Nobel

Fyrrverandi formaðurin í inuittafelagsskapinum ICC kanadiska Sheila Watt-Cloutier verður hildin at hava góðar møguleikar at fáa ársins Nobel-friðarheiðursløn. Millum teirra, sum hon kappast við, er fyrrverandi amerikanski varaforsetin Al Gore. Sheila Watt-Cloutier sigur við eina kanadiska tíðindastovu, at hon ætlar sær at hava teloefonin a hjá sær, skuldi tað hent, at norska Nobel-nevndin ringir. Vinnarin verður kunngjørdur fríggjadagin.



## Miðvingar fáa skelti

Í flestu bygdum kring landið eru skelti, sum siga, hvussu teir ymsu gøturnar í bygdini eita. Men í Miðvági er einki gøtunavnaskelti komið upp enn, og sambært heimasíðuni hjá kommununi hava mong spurt eftir skeltunum. Kommunan sigur, at ein misskiljing millum kommununa og virkið, sum ger skeltini, hevur seinkað verkætlanini. Aðrir trupulleikar hava eisini verið, men teir eru beindir av vegnum, so nú fara skeltini í Miðvági at nærkast.

# rkisvinnuni í Føroyum



*nu tey, sum hava ábyrgdina av føroysku fiskavirkjunum, ikki liva við.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*- Antin manna vit fiskavirkini – ella manna vit tey ikki. Velja vit tað seinna, er einki annað at gera enn at lata virkini aftur, sigur Andreas F. Hansen, sum hevur verið virkisleiðari á Sandoy Seafood og formaður í Føroya Ráfiskakeyparafelag Mynd: Jens Kr. Vang*

virkisvinnu hava í Føroyum.

- Sum gongdin er í løtuni, steðgar henda framleiðsla av sær sjálvum, leggur hann aftrat.

### Ikki hug til fisk

Fyrrverandi formaðurin í Føroya Ráfiskakeyparafelag ásannar, at unga ættarliðið í Føroyum hevur ikki hug at standa á einum fiskavirkisgólvi.

- Soleiðis er tað bara, og hesum mugu vit liva við og innrætta okkum eftir – antin vit vilja tað ella ikki. Ungdómurin hevur øll møgulig útbúgvingar- og arbeiðstilboð. Tað er bara at hyggja í bløðini; tú finnur einar 20-30 lýsingar hvønn dag, har søkt verður eftir arbeiðsfólki til eitt og annað, sum ikki hevur við fisk at gera. Útbúgvingartilboð og tænastuvinna av ymiskum slagi draga ungdómin til sín, og eisini bankar ein møgulig oljuvinna á dyrnar.

Andreas dylur ikki, at var hann ungur í dag, hevði hann heldur ikki vígt sítt lív til eitt fiskavirkisgólv.

- Var eg ungur, hevði eg gjørt júst tað sama, sum okkara ungdómur ger. Eg hevði leitað aðrar vegir enn til fiskavirkisvinnuna, og soleiðis er tað bara. Tað er tungt og einstáttað at arbeiða í fiski. Nýggja ættarliðið leitar aðrar vegir, og tað er væl skiljandi. Hetta mugu vit bara ásanna og gera nakað við. Skulu vit framhaldandi hava eina fiskavirkisvinnu í Føroyum, mugu vit hava onnur fólk at gera tað arbeiði, sum fjøldin av ungdóminum ikki hevur hug til.

Hann sigur seg skilja føroyskan ungdóm sera væl.

- Fólk hava hug at gera okkurt annað. Tøknin er tiltalandi, og tað eru útbúgvingarnar, bæði í Føroyum og uttanlands, eisini. Men hesum kunnu tey, sum hava ábyrgdina av føroysku fiskavirkjunum, ikki liva við.



virkjunum, ikki liva við.

### Eingin kapping

Andreas F. Hansen er sannførdur um, at útlendska arbeiðsmegin á føroysku fiskavirkjunum fer ikki at kappast við føroysku arbeiðsmegina.

- Tá okkum vantaði fólk á Sandoy Seafood, tóku vit fundir við arbeiðarafeløgini í oynni, men tey høvdu einki fólk at vísa okkum á. Vit lýstu í Útvarpi Føroya, men tað gav einki úrslit.

*- Var eg ungur, hevði eg gjørt júst tað sama, sum okkara ungdómur ger. Eg hevði leitað aðrar vegir enn til fiskavirkisvinnuna, og soleiðis er tað bara. Tað er tungt og einstáttað at arbeiða í fiski. Nýggja ættarliðið leitar aðrar vegir, og tað er væl skiljandi, sigur Andreas F. Hansen*

Eingin meldaði seg at koma til arbeiðis hjá okkum. Tískil vantaði okkum nógv fólk, tá mest var at gera, og hetta kostaði okkum nógvan pening í mistum inntøkum.

Á Sandoy Seafood hava tey eisini verið noydd at senda fisk óvirkaðan av landinum, tí ov lítið var av fólki at virka fiskin til dýrari fiskavørur.

- Í stuttum er støðan hon, at antin manna vit fiskavirkini – ella manna vit tey ikki. Velja vit tað seinna, er einki annað at gera enn at lata virkini aftur, sigur hann avgjørdur.

Andreas er púra samdur við Meinhardi Jacobsen, stjóra í Føroya Fiskavirking, at tað gongur alt ov seint hjá politisku myndugleikunum at broyta mannagongdina, so lættari verður hjá føroyskum fiskavirkisleiðslum at fáa neyðugu arbeiðsmegina til landið.

- Teir siga um tríggjar mánaðir og aftur um tríggjar mánaðir, men tað hendir bara einki. Higartil er alt bara vorðið til tos og aftur tos. Tú kanst tí ikki trúgva tí, sum politikararnir siga í hesum máli, og tað er ov vánaligt, slær hann fast.

### Stuðulskipanin

Fyrrverandi fiskavirkisleiðarin vísir á, at hóast vit hava eina fiskavirkisskipan, sum gevur ískoyti til veruligu inntøkuna hjá teimum, sum arbeiða á fiskavirkjunum, so er hetta ikki nóg mikið til tess at halda fólki til virkini.

- Mær dámar ikki best slíkar stuðulsskipanir, men tað er ein veruleiki, at vit hava eina slíka – og so kortini vantar fólk á flestu virkjum, tá fiskur er, sigur Andreas F. Hansen, sum heldur, at útlitini hjá okkara fiskavirkisvinnu í løtuni eru døpur.